**1. Formæli** .......... **2**
**2. Seinastu 20 árini** .......... **3**
2.1. Lógargrundarlag .......... 3
2.2. FRískúlar í Føroyum í hesum tíðarskeiði. .......... 4
2.2.1. Sankta Frans Skúli.
2.2.2. Adventistaskúlin.
2.2.3. Góðkenning av nýggjum fRískúlum.
2.2.4. Royndarskúlin hjá Sharon Weiss.
2.2.5. Aðrar ætlanir um fRískúla ella privatskúla?
2.2.6. Fólkaskúlalógin frá 20.06.1997.
2.2.7. Samgonguskjalið frá 9. mai 1998.
2.2.8. Útbúgvingarpolitikknevndin.
2.2.9. Úr heimsyvirlýsing ST um mannarættindi.

**3. Hvat eyðkennir ein fRískúla í mun til fólkaskúlan.** .......... **6**
3.1. Ymisk sløg av fRískúlum. .......... 6
3.2. Hvør kann vera lærari á fRískúla? .......... 7
3.3. Eftirlit við fakliga støðinum í undirvísingini. .......... 7

**4. Fígging av fRískúlum.** .......... **9**
4.1. Fígging av fólkaskúlanum. .......... 9
4.2. Fígging av verandi fRískúla. .......... 10
4.3. Um fígging av fRískúlum. .......... 10
4.3.1. Lærarалønir.
4.3.2. Rakstur.
4.3.3. Høli.
4.4. Hvussu stóran part skal tað almenna fíggja? .......... 11
4.4.1. Samanborið við Danmark …

**5. FRískúlar í Føroyum?** .......... **13**
5.1. Smáir, lokalir skúlar. .......... 13
5.2. Skúlar við ávísum pedagogiskum og/ella hugsjónarligum grundarlag. .......... 14
5.3. Skúlar við ávísum átrúnaðarligum ella etiskum grundarlag. .......... 15
5.4. Hvussu stórur partur av næmingunum kann hugsast at fara í fRískúlar? .......... 15
5.5. Er tørvur á fRískúlum í Føroyum? - Ella á rættinum til fRískúlar? .......... 16

**Uppskot til løgtingslóg um fRískúlar** .......... **17**
**Viðmerkingar til uppskot um løgtingslóg um fRískúlar** .......... **21**
**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar** .......... **21**
Samandráttur av lógaruppskotinum .......... 22
Hoyringsskriv .......... 22
Umsitingarligar avleiðingar .......... 23
Umhvørvisligar avleiðingar .......... 23
Altjóða reglur, sum hava ávirkan á viðurskiftini .......... 23
Fíggjarligar avleiðingar av lógaruppskotinum .......... 24
Fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar .......... 24
Fíggjarligar avleiðingar fyri landstýrið .......... 25
**Kapittul 2. Serligar viðmerkingar** .......... **25**

# <u>1. Formæli</u>

Tann 17.08.1999 setti landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum ein arbeiðsbólk við hesum arbeiðssetningi: “Við atliti at bústaðarmynstrinum í Føroyum (at) lýsa málið um frískúlar (privatskúlar) og tørv á hesum í okkara samfelagi, at skriva álit um málið og at geva landsstýrismanninum eitt ummæli av málinum, at gera eitt lógaruppskot um frískúlar at leggja fyri løgtingið og at lýsa væntandi fíggjarligar avleiðingar, um eitt lógaruppskot um frískúlar verður samtykt.”

Tey, ið manna arbeiðsbólkin, eru hesi:

Thordis Dahl Hansen, námsráðgevi, formaður
Emmy Joensen, skúlastjóri (umboð Føroya Lærarafelag)
Petur Sigurd Rasmussen, fyrrv.varaskúlastjóri (umboð Føroya Lærarafelag)
Katrin D. Johansen, lærari (umboð Adventistaskúlans)
Elin Henriksen, pedagogur (fyrrv. frískúlalærari).

Nevndin hevur havt 15 fundir.

Poul Nolsøe hevur sum løgfrøðingur hjálpt til at orða lógaruppskotið og viðmerkingarnar.

Arbeiðsbólkurin handar við hesum landsstýrismanninum umbidna arbeiðið.

Emmy Joensen Katrin D. Johansen Elin Henriksen

Petur Sigurd Rasmussen Thordis Dahl Hansen

**<u>Um heitini *privatskúli* og *frískúli.*</u>**
Heitini *privatur skúli* og *frískúli* verða ofta nýtt hvørt um annað. Nevndin hevur avgjørt at nýta heitið ***frískúli***, sum kann umfata bæði *privatskúla* og s*jálvsognarstovn*.
Høvuðsmunurin millum hesi bæði sløg av frískúlum er, at eingin eigur ein sjálvsognarstovn; hann er skipaður við góðkendum viðtøkum og virkar undir leiðslu av einum stýri. Ein privatan skúla eigur onkur; ein privatpersónur ella ein felagsskapur. Privatskúlin *kann*, men *skal* ikki, hava eitt stýri sum ovastu leiðslu; og nógv lægri krøv verða sett til viðtøkurnar hjá einum privatskúla enn hjá einum sjálvsognarstovni.

# 2. Seinastu 20 árini.

## 2.1. Lógargrundarlag.

Lógarkarmurin fyri frískúlum í Føroyum hevur seinastu 21 árini verið at funnið í løgtingslóg nr. 58 frá 02.10.1978 um skúlafyrisiting, kapittul 5 og 6. Har stendur:

**Kapittul 5. Sjálveigandi stovnar**.
**§23.** Ein sjálveigandi stovnur, ið gevur undirvísing, ið svarar til fólkaskúlans, ella eina undirvísing, ið miðar ímóti einari alment góðkendari útbúgving ella roynd, skal góðkennast av landsskúlaráðnum at hava rætt til at geva hesa undirvísing.
*2. stk.* Viðtøkur stovnsins skulu góðkennast av landsskúlaráðnum.
*3. stk.* Allir sjálveigandi undirvísingarstovnar, ið sambært lóg ella fíggjarlógarjáttan hava rætt til studning frá tí almenna, fáa studningin ávístan av skúlafyrisitingini eftir nærri av landsskúlaráðnum ásettum reglum.
**§24.** Allir sjálveigandi undirvísingarstovnar verða leiddir av einum fyristøðumanni og eru undir eftirliti av einari serligari nevnd.
**§25.** Nevndin ger í samráð við lærararáðið tilmæli til landsskúlaráðið um stovnsins undirvísningarætlan og broyting í hesari.
*2. stk.* Hon ger tilmæli til landsskúlaráðið um setan og loysn úr starvi av fyristøðumanni og lærarum.
*3. stk.* Hon ger í samráð við lærararáðið árliga fíggjarætlan fyri skúlan. Fíggjarætlanin verður send skúlafyrisitingini.
*4. stk.* Hon letur frá sær roknskap fyri stovnin eftir galdandi reglum, ið skúlafyrisitingin fyrisetur.
*5. stk.* Hon tekur í samráð við lærararáðið lut í byggimálum viðvíkjandi stovninum eftir nærri av landsstýrinum ásettum reglum.
*6. stk.* Hon kann, møguliga í samráð við lærararáðið, taka allar spurningar av týdningi fyri stovnin til viðgerðar og leggja hesar fyri skúlafyrisitingina. Hon skal geva tilmæli í øllum málum, ið løgd verða fyri hana av skúlafyrisitingini.
**§26.** Fyristøðumaðurin hevur ta dagligu umsitingarligu og undirvísingarligu ábyrgd av stovninum. Hann er avgreiðslustjóri hjá nevndini. Hann tekur lut í nevndarfundum uttan atkvøðurætt.

**Kapittul 6. Privatir skúlar.**
**§27.** Privatir skúlar, sum geva eina undirvísing svarandi til undirvísingina í fólkaskúlanum ella eina undirvísing, ið miðar ímóti eini alment góðkendari útbúgving ella roynd, skal góðkennast av landsskúlaráðnum við rætti til at geva tílíka undirvísing. Tílíkir skúlar mugu bert góðkennast, um so er, at tað er ein rímiligur tørvur á hesum.
*2. stk.* Leiðslan fyri einum góðkendum privatum skúla skal tryggja, at hann fylgir teimum í lóggávuni og í góðkenningini ásettu reglum um virki sítt. Um so er, at ein tílíkur skúli sambært lóg ella fíggjarlógarjáttan hevur rætt til studning frá tí almenna, verður studningurin ávístur av skúlafyrisitingini eftir nærri av landsskúlaráðnum ásettum reglum.

## 2.2. Fríkúlar í Føroyum í hesum tíðarskeiði

Tá ið lóg um skúlafyristing kom í gildi í 1978, vóru 2 frískúlar í Føroyum. Tað vóru Sankta Frans Skúli og Adventistaskúlin, báðir í Havn.

2.2.1. Sankta Frans Skúli var privatur skúli fram til 1985 og helt frá skúlaárinum 1985/86 fram sum kommunuskúli í Tórshavnar Kommunu við rætti at halda fram við forskúlanum.

2.2.2. Adventistaskúlin var stovnaður í 1964 sum privatskúli; og tað er hann enn. Skúlin hevur í skúlaárinum 1999/2000 107 næmingar í 1.-7. flokki. Leiðsla skúlans er eitt stýri við umboðum fyri foreldrini, adventistasamkomuna og skúlan. Stýrið setur lærarar í starv. Skúlin kunnar Undirvísingar- og Mentamálaráðið um undirvísingarætlan sína og onnur viðkomandi viðurskifti.

2.2.3. Góðkenning av nýggjum frískúlum.
Sambært §27 í lóg um skúlafyristing frá 1978 skulu privatir skúlar, sum geva eina undirvísing svarandi til undirvísingina í fólkaskúlanum, góðkennast av landsskúlaráðnum við rætti til at geva tílíka undirvísing. Nær teir kunnu góðkennast, er eisini ásett: *"Tílíkir skúlar mugu bert góðkennast, um so er, at tað er ein rímiligur tørvur á hesum."*

2.2.4. Royndarskúlin hjá Sharon Weiss.
Í 1987 byrjaði ein royndarskúli í Havn við 8 børnum, ið vóru 5-7 ára gomul. Hesin skúli var at meta sum ein forskúli. Hann fekk ongan studning úr landskassanum, men fekk studning frá Tórshavnar Kommunu, sum var ájavnur við foreldragjaldið. Á vári 1988 søktu foreldrini landsskúlaráðið um loyvi til, at børn teirra kundu halda fram í 1. flokki á hesum royndarskúla - tey vóru, um neyðugt, sinnað at bera allan kostnaðin sjálv. Landsskúlaráðið noktaði við tí grundgeving, at tað ikki metti nakran rímiligan tørv vera á hesum skúla. Foreldrini kærdu til landsstýrið, sum gav landssskúlaráðnum viðhald.

2.2.5. Aðrar ætlanir um frískúla ella privatskúla?
Nevndini kunnugt hava ikki verið aðrar *ítøkiligar* ætlanir um at stovna privatskúla ella frískúla (sjálvsognarstovn) í Føroyum seinastu 21 árini.

2.2.6. Í Fólkaskúlalógini frá 20.06.1997 stendur um skúlaskyldu, frískúlar o.tíl.:
**§41.** Eitt og hvørt undirvísingarskyldugt barn hevur skyldu at ganga í fólkaskúlan, um tað ikki á annan hátt fær eina undirvísing, ið kann javnmetast við ta, sum vanliga verður kravt í fólkaskúlanum.
*Stk 2.* Ikki kann verða kravt, at eitt undirvísingarskyldugt barn verður skrivað inn í fólkaskúlan, um so er, at tað verður skrivað inn í ein góðkendan privatskúla, ella um tann, ið hevur ábyrgdina av

undirvísing barnsins, smb. §65, váttar skrivliga fyri skúlastýrinum, at hann sjálvur vil skipa fyri undirvísingini. Sama er galdandi fyri næmingar, sum eftir 7. floksstig halda fram í einum góðkendum eftirskúla, háskúla, húshaldsskúla ella á einum góðkendum skeiði.

**§43.** *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann gera greiniligar reglur um eftirlit við teimum góðkendu privatskúlunum.
*Stk. 3.* Tá ið eitt skúlaár byrjar, skal leiðarin í einum góðkendum privatskúla senda skúlastýrinum ein lista yvir næmingarnar í skúlanum.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta greiniligari reglur um krøv og umsjón við heimaundirvísing.

**§47.** *Stk. 2.* Kommunustýrið hevur eftirlit við, at øll undirvísingarskyldug børn í kommununi verða innskrivað í fólkaskúlan, smb. §44, 1. stk., ella at tey á annan hátt fáa eina undirvísing, ið kann javnmetast við ta, sum vanliga verður kravd í fólkaskúlanum. Eftirlitsskyldan fer tó úr gildi, um næmingurin verður undirvístur í einum góðkendum privatskúla, ið hevur valt sítt egna eftirlitsfólk.

### 2.2.7. Samgonguskjalið frá 9. mai 1998.

Í galdandi samgonguskjali millum tjóðveldisflokkin, fólkaflokkin og sjálvstýris-flokkin stendur í 10. parti: "Møguleiki skal vera fyri frí- og eftirskúlum."

### 2.2.8. Útbúgvingarpolitikknevndin.

Í *"Áliti til landsstýrismannin í undirvísingar- og granskingarmálum og til landsstýrismannin í sjálvstýrismálum í sambandi við ráðlegging av útbúgvingar- og granskingarpolitikki í framtíðini og í sambandi við sjálvstýrisverkætlanina"* verður í bindi II, bls. 28, sagt soleiðis um privatskúlar: " Ein annar mennandi táttur innan øll virkisøki er kapping. Tað eigur sum skjótast at fáast lógarheimild fyri, at tey, sum vilja fara undir annarleiðis undirvísing, eiga at fáa loyvi til tess. Hetta kann gerast við privatskúlaskipan, har samfelagið veitir lutfalsligan stuðul til raksturin og læraralønirnar. Hetta fer at vera ein eggjandi faktorur til fólkaskúlaundirvísingina og fer uttan iva at gera undirvísingina munandi betri."

### 2.2.9. Úr heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi.

§26, stk. 3: "Foreldur hava fyrsta rætt at velja, hvat slag av undirvísing skal vera givin børnum teirra."

# <u>3. Hvat eyðkennir ein frískúla í mun til fólkaskúlan</u>

Tað, sum fyrst og fremst eyðkennir ein frískúla, er, at tað er tann einstaki skúlin, sum avger, hvat <u>endamál</u> skúlans er, og hvussu virkast skal fyri at røkka hesum endamáli; herundir <u>undirvísingarinnihald</u> og <u>undirvísingarhættir</u>.

Skúlin leggur fram <u>endamálsgrein</u> og ætlan sína, og síðani hava foreldur at børnum í skúlaaldri høvi at velja børnum sínum skúla - um tey eru til reiðar at leggja tann pening, tíð og orku í, sum krevst av foreldrunum á einum frískúla.

Ein frískúli er vanliga ein <u>sjálvsognarstovnur</u>, har ið leiðslan er eitt skúlastýri. Foreldrini eru altíð umboðað í stýrinum; og um ein felagsskapur er, sum stuðlar skúlan, hevur hann vanliga eisini umboð í stýrinum.

Tað er umráðandi á einum frískúla, at lærarar skúlans eru samdir um ta linju, sum skúlin skal rekast eftir. Tí verða <u>skúlaleiðari og lærarar</u> á einum frískúla settir av stýrinum fyri skúlan.

<u>Fakliga støðið</u> í undirvísingini skal standa mát við tað í fólkaskúlanum; men frískúlin avger sjálvur, *hvussu* hetta fakliga støðið verður nátt.

## <u>3.1. Ymisk sløg av frískúlum</u>

Hyggja vit at grannalondum okkara, finna vit nógv ymisk sløg av frískúlum.

Summir frískúlar eru eyðkendir av at hava eitt ávíst pedagogiskt grundarlag. Teir eru t.d. Grundtvig-Koldsku skúlarnir í Danmark, Rudolf Steiner-skúlar, Freinet-skúlar.

Aðrir skúlar eru teir, sum hoyra til ávísa kirkju ella trúarsamfelag. Størstu bólkarnir her eru katólsku skúlarnir og adventistaskúlarnir. Eisini eru fleiri evangelisk-lutherskir smáskúlar. - Hesir skúlar eru sjálvandi eisini fyri børn, sum ikki hoyra til nevndu kirkjur ella trúarsamfeløg.

Smáskúlarnir (“Lilleskoler”) vóru upprunaliga ofta sosialistiskir skúlar, men nú eru teir serliga eyðkendir av stødd síni og av at leggja stóran dent á kreativu lærugreinirnar.

Enn eitt slag av fYrískúlum finna vit í smáum bygdum, har kommunan hevur avgjørt at steingja bygdaskúlan og savna næmingarnar í felagsskúla. Tað eru einstøk dømi um, at foreldrini hava valt at varðveita bygdaskúlan sum fríiskúla.

## 3.2. Hvør kann vera lærari á fríiskúla?

Her kunnu nógv ymisk sjónarmið gera seg galdandi - líka frá einum kravi um, at allir lærarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving, til at tað almenna eingi krøv setur til útbúgving, hvørki viðvíkjandi góðkenning ella fígging.

Í grannalondum okkara er sera ymist, hvørji krøv verða sett til útbúgvingina hjá lærararum á fríiskúlum. Nøkur dømi:

- Í Danmark setur tað almenna als eingi krøv til, hvør kann vera lærari á fríiskúlum; hetta hevur onga ávirkan á góðkenning ella studning.
- Í Noreg verða sett somu krøv til útbúgvingina hjá fríiskúlalærarum sum hjá fólkaskúlalærarum (men krøvini til fólkaskúlalærarar eru ikki tey somu sum hjá okkum).
- Í Týsklandi er vanligt, at tað almenna krevur av lærarum á fríiskúlum, at teir skulu hava eina statsgóðkenda læraraútbúgving. Fólk uttan slíka útbúgving kunnu vera lærarar á fríiskúla, men studningur verður ikki latin til løn teirra.

Til eru fleiri ymiskir læraraskúlar, ið útbúgva fólk til fríiskúlalærarar. Summar av hesum útbúgvingum geva eisini rætt til at undirvísa í fólkaskúlanum, aðrar ikki.

Nevndin, ið ger hetta álit, hevur viðgjørt spurningin um, hvør kann vera lærari á fríiskúla, og er komin til ta niðurstøðu, at tað sum meginregla eigur at vera kravt, at lærarar á fríiskúlum hava eina relevanta pedagogiska útbúgvning - tað veri seg fólkaskúlalæraraútbúgving, fríiskúlalæraraútbúgvning ella faklæraraútbúgving.

## 3.3. Eftirlit við fakliga støðinum í undirvísingini

Ein fríiskúli ger sjálvur sína undirvísingarætlan og avger sjálvur, hvørjar lærugreinir koma á hvørjum floksstigi, og tímabýtið millum lærugreinirnar. Tað vil siga, at tað ikki beinleiðis ber til at samanbera førleika og kunnleika hjá næmingum í fríiskúla og fólkaskúla á sama aldursstigi, men *sum heild* má fakliga støðið í undirvísingini í fríiskúlanum ikki vera lægri enn í  fólkaskúlanum.

Fyri at tryggja, at undirvísingin sum heild kann javnmetast við ta, sum vanliga verður kravd í fólkaskúlanum, ber til at lata Undirvísingar- og Mentamálastýrið góðkenna undirvísingarætlanina hjá fríakúlum.

Eisini ber til at lata eitt umboð fyri Undirvísingar- og Mentamálastýrið gera regluligar vitjanir á frískúlanum við tí fyri eyga at hava eftirlit við fakliga støðinum.

# 4. Fígging av fRískúlum

Tá ið tosað verður um, hvørt tað skal bera til at hava fRískúlar í Føroyum, er tað sera umráðandi at skilja millum tveir spurningar.

Annar spurningurin er at skapa teir neyðugu lógarkarmarnar fyri fRískúlum, so sum:

- Hvussu farast skal fram, tá ein fRískúli skal stovnast.
- Hvør skal góðkenna fRískúlan.
- Hvørjar treytir skal fRískúlin lúka fyri at verða góðkendur.
- Hvussu verður fakliga støðið í undirvísingini tryggjað.
- Hvussu er leiðsla skúlans skipað, og hvør setur skúlaleiðara og lærarar í starv.
- Hvussu eru rættindi foreldranna og næminganna tryggjað.

Hin spurningurin er, hvussu fRískúlin skal verða fíggjaður:

- Skal tað almenna fíggja allar útreiðslur hjá fRískúlanum?
- Skulu foreldrini (og ymsir privatir stovnar ella virki) fíggja allar útreiðslur?
- Skulu foreldrini fíggja ein part og tað almenna ein part? Um ja:
- Hvussu stóran part skal tað almenna fíggja?

Allar metingar av, um tað skal bera til at stovna og reka fRískúlar, og hvussu dýrt hetta kann gerast fyri landið og kommunurnar, eru treytaðar av, hvussu stóran part av útreiðslunum tað almenna skal fíggja.

## 4.1. Fígging av fólkaskúlanum

Fíggingin av einum skúla kann býtast í 3 partar:

| | |
|---|---|
| • Lærarалønir | Landskassin |
| • Rakstur (undirvísingartilfar, hiti, el, reingerð o.a.) | Kommunan |
| • Høli | Kommunan |

Lærarалønirnar verða fíggjaðar við støði í næmingatalinum, við tað at talið á næmingum er grundarlagið fyri tí tilluttaða lærаratímatalinum. Lærararnir verða løntir sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Tað er rættiliga ymist, hvussu nógv hvør kommuna letur til raksturin av skúlanum. Burtursæð frá nøkrum fáum kommunum við heilt lágum barnatali eru árligu útreiðslurnar hjá kommunum til rakstur av skúlum millum umleið 5.000 kr. og 15.000 kr. fyri hvønn næming. Av tí, at umstøðurnar í kommunum eru sera ymiskar,

ber ikki til at finna eitt "rættvíst" miðaltal; men tað man ikki vera heilt av leið, um vit ganga út frá miðaltalinum 9.000 kr. um árið fyri hvønn næming til rakstrarútreiðslur.

Hølisútreiðslurnar kunnu vera sera ymiskar í teimum ymsu kommununum, alt eftir, hvussu gamal skúlin er, og um barnatalið er í vøkstri.

## 4.2. Fígging av verandi frískúla

Á Adventistaskúlanum fíggjar landskassin 85% av lønini hjá útbúnum lærararum og hjá óútbúnum 85% av grundlønini. Lærаratímatalið verður roknað út á sama hátt sum í fólkaskúlanum.
Til raksturin fær skúlin eina árliga upphædd frá Tórshavnar Kommunu, sum nú er 100.000 kr. T.v.s. at upphæddin, sum Adventistaskúlin fær, í ár er 935 kr.fyri hvønn næming; hetta svarar til umleið 10% av tí, sum ein fólkaskúli við somu støðd hevði fingið.
Til hølisútreiðslurnar fær Adventistaskúlin ongan almennan studning og hevur heldur ikki fingið nakran.
Restin av útreiðslunum verður fíggjað við foreldragjaldi og við studningi frá Adventistasamkomuni.
Býtið av útreiðslunum er soleiðis:

| | |
|---|---|
| Almennur studningur: | 60% |
| Foreldragjøld: | 20% |
| Aðrar inntøkur: | 20% |

## 4.3. Um fígging av fríkúlum.

Ein máti at fíggja fríkúlar kann vera hesin:

- Lærаralønir: Landskassin fíggjar ein ávísan %-part
- Rakstur: Kommunan fíggjar ein ávísan %-part (í mun til fólkaskúlan)
- Høli verða fíggjað av foreldrum og møguligum felagsskapi, ið stuðlar skúlan.

Fyrimunirnir við einum slíkum máta at fíggja fríkúlar er, at hann er einfaldur at umsita og lættur at gjøgnumskoða. Viðmerkingar:

### 4.3.1. Lærаralønir.

Talið á lærаratímum verður tillutað við støði í næmingatalinum, á sama hátt sum í fólkaskúlanum. Lønirnar verða samsvarandi sáttmálanum hjá Føroya Lærarafelag.

T.v.s. at einasti faktorur, sum skal regulerast, er, hvussu nógv % av læraralønini landskassin skal fíggja.

4.3.2. Rakstur.

Tað ber til at finna fram til, hvussu nógv hvør einstøk kommuna letur skúlanum/skúlunum í kommununi til rakstur, og rokna út, hvussu nógv tað er fyri hvønn næming. Síðani er eftir hjá politiska myndugleikanum at áseta, hvussu nógv % av hesum skal latast fnskúlanum fyri hvønn næming.

4.3.3. Høli.

Við tað at foreldrini og møguligur stuðulsfelagsskapur hjá fnskúlanum syrgja fyri hølum, verða tað eisini hesi, sum avgera góðskuna á teimum - sjálvandi innan fyri karmarnar av galdandi lógum.

## 4.4. Hvussu stóran part skal tað almenna fíggja?

Ein vanlig meginregla í samfelag okkara er, at um ein borgari innan okkurt ávíst øki ynskir ein valmøguleika, ella velur nakað annað enn tað, sum tað almenna hevur at bjóða, ja, so má hann eisini gjalda eyka fyri tað. (T.d. læknaviðgerð, undirvísing, flutningur.) Við frískúlum er talan um ein valmøguleika í mun til fólkaskúlan, og tí er rímiligt, at tann, sum velur frískúlan, má gjalda ein part. Hin vegin, um tað almenna einki skuldi fíggjað, so var ikki talan um nakran valmøguleika, tí so bar ikki til at reka frískúlar. Uppgávan er at finna fram til, hvussu stóran part tað almenna skal fíggja, fyri at tað yvirhøvur skal vera gjørligt at reka frískúlar.

Um landskassin fíggjar 85% av læraralønunum, og kommunan 85% av rakstrinum, so svarar hetta til umleið ¾ av øllum útreiðslunum, alt eftir kostnaðinum á hølum.
(Býtið millum land og kommunu kann eisini vera øðrvísi.)
Um tað almenna fíggjar 85% av læraralønum og av rakstrinum, ber til at stovna og reka ein fnskúla við einum foreldragjaldi, sum svarar umleið til foreldragjaldið fyri vøggustovu- ella barnagarðspláss.

Fer parturin, sum tað almenna fíggjar, niður um umleið ¾, kann tað gerast sera torført at stovna nýggjar frískúlar, tí um restin av útreiðslunum skal fíggjast við foreldragjaldi, verður hetta so høgt, at tey fæstu hava møguleika at hava børn síni í fnskúla. Tó kann hugsast, at onkur felagsskapur, stovnur ella virki kann stuðla ein fnskúla fíggjarliga.

4.4.1. Samanborið við Danmark …

Útrokningin av almenna partinum av fíggingini av frískúlum í Danmark er sera fløkt og gevur eisini ymiskan %-part fyri ymiskar skúlar. Men miðaltølini eru hesi:

| | |
|---|---|
| Almennur studningur tilsamans: | 77,6% |
| Foreldragjald: | 17,9% |
| Aðrar inntøkur: | 4,5% |

(Kelda: De frie grundskoler i tal, Undervisningsministeriet 1999)

# 5. Frískúlar í Føroyum?

## 5.1. Smáir, lokalir skúlar

Hóast tað verður loyvt at stovna frískúlar í Føroyum, og studningur verður latin teimum, so er ikki sagt, at eitt ótal av smáum skúlum fer at stinga seg upp.

Sum treyt fyri, at ein frískúli kann vera góðkendur til at fáa almennan studning, kann setast, at hann hevur eitt ávíst tal av næmingum. Sambært §13, stk. 3, í fólkaskúlalógini er hetta galdandi sum meginregla fyri fólkaskúlar: *"Skúli, ið hevur millum 1 og 14 næmingar, er 1-flokkaður. Skúli, ið hevur millum 15 og 30 næmingar, er 2-flokkaður."*(o.s.fr.) Við støði í hesum tølum skjýtur nevndin upp, at ein frískúli fyri at verða góðkendur við rætti til studning skal hava minst 12 næmingar fyrsta árið, og at næmingatalið eftir 3 árum skal vera komið upp á minst 28.

Skal ein frískúli vinna undirtøku millum foreldur, so má hann hava okkurt annað at bjóða, enn fólkaskúlin hevur. Dømi eru aðrastaðni um, at royndir at stovna frískúlar, ið ikki hava annað grundarlag enn at vera ímóti onkrum, sum finst í fólkaskúlanum, sjáldan eydnast.

Eitt nokk so vanligt ynski millum foreldur í Havn, og kanska eisini í øðrum størri plássum, er at fáa børn síni inn á ein skúla, ið ikki er ov stórur, og sum er í nánd av bústaðnum. Um ein frískúlalóg kemur, sum loyvir frískúlum og tryggjar teimum almennan studning, so er ikki óhugsandi, at foreldur í onkrum býarparti, haðani langt er til kommunalu skúlarnar, royna at fáa ein frískúla í lag.

Avleiðingarnar av, um ein frískúli kemur í einum øki, eru sera ymiskar, um talan er um Havnina ella annað stórpláss, ella um tað er í einum øki við fleiri smáum skúlum.

Í býunum kann hugsast, at um nógvir næmingar fara at ganga í frískúla, verður ein avleiðing, at ein fleirsporaður skúli missir eitt spor á onkrum árgangum. Og er frammanundan plásstrot í kommunala skúlaverkinum, kann talan vera um eina sparing fyri tað almenna, um frískúli verður settur á stovn.

Í einum øki við fleiri smáum skúlum kann tað fáa stóra ávirkan á tillutaða tímatalið og harvið lærаratalið í fólkaskúlanum, um ein frískúli verður stovnaður, og nógvir næmingar fara at ganga í honum. Men ein frískúli í einum ótætt bygdum øki má fáa næmingar langvegis frá fyri at fáa nóg mikið av næmingum. Vanligt er, bæði í Føroyum og aðrastaðni, at foreldur leggja stóran dent á, at børnini sleppa at ganga ið

hvussu er fyrstu skúlaárini í ein skúla, sum ikki er ov langt heimanífrá. Tí er ivasamt, um ein frískúli á bygd ella í einum øki við fleiri smáum bygdum hevði kunnað fingið nóg mikið av næmingum.

Eitt, sum eyðkennir frískúlan, er tann stóra ávirkanin, sum foreldrini kunnu hava á skúlan. Men við skúlastýrunum, sum koma við fólkaskúlalógini frá 1997 (Kapittul 6), er møguleiki fyri, at eisini foreldur í fólkaskúlanum kunnu fáa størri ávirkan á fólkaskúlan, kanska serliga á teimum smærru skúlunum.

Við hesum í huga er sannlíkt, at ein møgulig misnøgd millum foreldur við okkurt í fólkaskúlanum ikki førir til ætlanir um at stovna frískúla, men heldur at royna at gera sína ávirkan galdandi í fólkaskúlanum. Hin vegin er væl hugsandi, at møguleikin fyri frískúla kann gera fólkaskúlan meira opnan fyri ynskjum hjá foreldrunum.

## 5.2. Skúlar við ávísum pedagogiskum og/ella hugsjónarligum grundarlag

Aðalmálið við at hava eina frískúlalóg er at gera tað møguligt hjá einum bólki av foreldrum og/ella lærarum, sum ynskja tað, at stovna og reka ein skúla, ið er grundleggjandi øðrvísi enn fólkaskúlin.

Fólkaskúlin er fyri øll, og tí er avmarkað, hvørjir møguleikar ið eru at royna eina undirvísing, ið er heilt øðrvísi enn tann vanliga. Her hevur frískúlin betri møguleikar, við tað at foreldrini sjálv velja hesa skúlaskipan.

Mangan verður hildið, at nóg mikið av rúmi er í fólkaskúlanum fyri royndarundirvísing av ymsum slag, og at tað ikki er neyðugt við frískúlum fyri at royna nakað annað. Tí skulu her nevnast nøkur fá *dømi* um, hvat *kann* vera øðrvísi í einum frískúla:

- Undirvísingin er ikki býtt sundur í lærugreinir.
- Skúladagurin er ikki býttur í tímar.
- Flokkarnir eru ikki býttir eftir aldrinum á næmingunum.
- Ongar skúlabøkur verða nýttar.
- Heilt aðrar lærugreinir enn í fólkaskúlanum.
- Lærugreinir koma á øðrum aldursstigi enn í fólkaskúlanum.
- Innihaldið í lærugreinunum er heilt øðrvísi enn í fólkaskúlanum.

Ein øðrvísi skúlagongd hevði kravt so mikið nógv undantøk frá fólkaskúlalógini, umframt undirtøku frá foreldrum, lærarum og skúlanevndum, at tað er rættiliga óhugsandi, at hon var gjørlig innan fyri karmarnar hjá fólkaskúlanum. Serliga við

atliti at, at foreldur mugu kenna seg trygg við tann skúla, børnini fara í, má tað vera ein fortreyt fyri einari grundleggjandi øðrvísi undirvísing, at foreldrini sjálv velja hana - sum tey kundu fingið møguleika fyri við einari fTrískúlalóg

## 5.3. Frí887skúlar við ávísum átrúnaðarligum ella etiskum grundarlag

Allastaðni í heiminum eru dømi um, at kirkjur ella trúarsamfeløg reka sínar egnu skúlar - uttan at tað tó er treyt fyri upptøku, at næmingarnir hoyra til viðkomandi kirkju ella trúarsamfelag.

Í Føroyum hava vit ein fólkaskúla, har ein partur av grundarlagnum er at geva børnunum eina kristna uppaling, samstundis sum undirvísingin skal vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði. (Fólkaskúlalógin frá 20.06.97, §2, stk. 3.)
Undirvísingin í kristnikunnleika í fólkaskúlanum skal samsvara við fólkakirkjunnar evangelisk-luthersku læru. (§6, stk.1.) Tó kunnu foreldur velja, at børn teirra verða frítikin fyri undirvísing í kristnikunnleika; og reglur eru fyri, hvussu børnunum tá skal vera tryggjað tilsvarandi undirvísing. (§6, stk. 2 og 3.)

Um ein fTrískúlalóg verður sett í gildi, so verður eisini í Føroyum møguligt at stovna frískúlar við ávísum átrúnaðarligum ella etiskum grundarlag.

## 5.4. Hvussu stórur partur av næmingunum kann hugsast at fara í frískúlar?

Hesum spurningi er ógjørligt at svara. Vit vita einki um nakrar ítøkiligar ætlanir um at stovna nýggjar frískúlar; og ongar kanningar hava verið av, hvussu stórur áhugi er fyri frískúlum millum foreldur og lærarar í Føroyum.

Tað er ið hvussu er ikki sannlíkt, at nógvir og stórir frískúlar fara at koma, fyrsta dagin teir verða loyvdir við rætti til almennan studning. Hyggja vit at gongdini aðrastaðni, so er tað soleiðis, at parturin av næmingum, sum ganga í frískúla, ikki *knappliga* økist ella minkar. Ikki kann metast, at nakar vandi er fyri, at fólkaskúlaskipanin fer um koll ella verður fyri álvarsligum bakkasti, hóast onkur frískúli kanska verður stovnaður. *Um* nýggir frískúlar fara at koma, er tað mest sannlíkt, at vøksturin av teimum verður so líðandi, at fólkaskúlin (og kommunur og skúlamyndugleikar) fáa tíð at laga seg eftir broyttu viðurskiftunum.

Danmark hevur í meir enn 100 ár havt eina lagaliga frískúlalóg - tann nú galdandi er væl lagaligari enn uppskotið til frískúlalóg í Føroyum. Kortini var parturin av næmingum í frískúlum í Danmark í 1970 ikki meir enn 6%, og seinastu 30 árini er hann spakuliga vaksin til 12%. (Hetta er miðaltal fyri alt landið. Í nógv flestu kommunum er parturin av frískúlanæmingum millum 0 og 10%, meðan bert 10 kommunur hava millum 25 og 33% frískúlanæmingar.)

## 5.5. Er tørvur á frískúlum í Føroyum? - Ella á rættinum til frískúlar?

Hyggja vit at londunum rundan um okkum, er tað soleiðis, at rætturin til at stovna og reka frískúlar verður mettur sum ein **sjálvsagdur demokratiskur rættur**. Tó eru sera ymiskar siðvenjur og lógir fyri, hvussu lætt - ella torført - tað er at reka frískúlar, huvssu umfatandi almenna eftirlitið er, og hvussu stóran part av útreiðslunum tað almenna fíggjar.

Tað ber væl til at taka støðu til ein demokratiskan rætt, uttan at taka støðu til tað, sum kann fremjast út frá hesum rætti. T.d. er neyvan nakar ímóti skrivifrælsi ( - sum er lutvíst alment fíggjað - ), hóast eingin kann taka undir við øllum, sum kemur alment á prent. Á sama hátt ber til at vera fyri, at frískúlar eru **loyvdir** ( - og lutvíst alment fíggjaðir - ), hóast ein er ímóti frískúlum sum so.

At vera fyri at loyva frískúlum er ikki tað sama sum at vera fyri frískúlum.

At gera tað møguligt at stovna og reka frískúlar í Føroyum er enn eitt stig á leiðini til at seta í verk heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða um mannarættindi, har §26, stk. 3, er soljóðandi: ***"Foreldur hava fyrsta rætt at velja, hvat slag av undirvísing skal vera givin børnum teirra."***

**Tað kann ikki vera ein almenn uppgáva at gera av, hvørt tørvur er á frískúlum í Føroyum ella ikki; líka lítið sum tað er ein almenn uppgáva at stovna og reka frískúlar.**

**Uppgávan hjá tí almenna er at seta lógargrundarlagið fyri frískúlum; og so má tað vísa seg, um tað finnast fólk, ið meta tørvin á frískúla vera so stóran, at tey fara undir at stovna og reka ein frískúla. Rætturin til at gera hetta má metast sum ein partur av demokratisku rættindunum í samfelag okkara.**

# Uppskot

# um

# Løgtingslóg um fabriskúlar

## Kapittul 1
## Endamál og virkisøki

**§ 1.** Endamálið við lógini er at skipa viðurskiftini og tann almenna stuðulin til frískúlar í Føroyum og áseta karmarnar fyri virkseminum.

**§ 2**. Lógin er galdandi fyri frískúlar, sum undirvísa aldursbólkum samsvarandi 1.- 9. flokki í fólkaskúlanum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann geva loyvi til, at forskúlaflokkar og framhaldsdeild eftir 9. flokk eisini koma undir lógina.
*Stk. 3.* Ein frískúli skal í minsta lagi bjóða undirvísing í 1.- 7. flokki.

**§ 3**. Skúlin skal geva nemingunum møguleika at fara til fráfaringarroynd fólkaskúlans.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann geva einum fríkúla loyvi at hava somu royndir og vallærugreinir sum fólkaskúlin. Reglurnar fyri royndunum eru tær somu sum í fólkaskúlanum, og skúlin ger sjálvur av, á hvørjum floksstigi royndirnar fara fram.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í samráð við skúlamyndugleikarnar á staðnum loyva nemingum úr fríkúlum at taka fráfaringarroyndirnar í fólkaskúlanum.

## Kapittul 2
## Góðkenning og eftirlit

**§ 4.** Landsstýrismaðurin skal góðkenna ein fríkúla, áðrenn farast kann undir undirvísingina.
*Stk. 2.* Fyri at fáa góðkenning skal fríkúlin vera:

1. ein fakligur og/ella námsfrøðiligur valmøguleiki í mun til almenna skúlan
2. skipaður fyri at nøkta ein størri undirvísingartørv enn vanligt ella
3. skipaður av átrúnaðarligum grundum.

*Stk. 3.* Undirvísingarhøli og útbúnaður skulu góðkennast av landsstýrismanninum og so vítt gjørligt verða tillagað tørvinum hjá brekaðum.

**§ 5.** Áðrenn ein fríkúli kann fara undir virksemi sítt, skal skjalprógvast við undirskrift foreldranna áðrenn 1. september árið undan byrjanarárinum, at í minsta lagi 12 nemingar eru innskrivaðir.
*Stk. 2.* Eftir trimum árum skal nemingatalið vera í minsta lagi 28.
*Stk. 3.* Lýkur skúlin ikki treytirnar ásettar í stk. 1 og 2, kann landsstýrismaðurin loyva skúlanum at halda fram við ella uttan stuðul.

**§ 6.** Fríkúlarnir verða skipaðir sum sjálvsognarstovnar, hvørs viðtøkur skulu góðkennast av landsstýrismanninum. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um karmar og innihald í viðtøkunum.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann taka aftur góðkenningina av einum fmrískúla, um so er, at skúlin ikki heldur galdandi reglur.

**§ 7.** Undirvísingarætlan skúlans skal góðkennast av landsstýrismanninum.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin hevur eftirlit við fmrískúlum og kann í hesum sambandi biðja um allar neyðugar upplýsingar um næmingar, lærarar, undirvísingina og skúlans rakstur.

**§ 8**. Talið á døgum í skúlaárinum er í minsta lagi tað sama sum í fólkaskúlanum.

## Kapittul 3
## Rættur næminganna

**§ 9**. Fmrískúlar hava skyldu at taka næmingar inn úr øllum landinum.
*Stk. 2.* Stýrið fyri skúlan kann áseta almennar reglur fyri innskrivingini. Høvuðsreglan er, at børn hava sama rætt at verða innskrivað í fmrískúlan sum í fólkaskúlan.
*Stk. 3.* Heimstaðarkommunurnar hjá næmingunum skulu í september mánaði hava boð um tey børn í kommununi, sum eru innskrivað í inniverandi skúlaári.

**§ 10.** Næmingarnir hava rætt til at gera seg lidnar við tað skúlaárið, sum er byrjað.
*Stk. 2.* Um skúlin er floksbýttur, verður uppflytingin av næmingum framd á sama hátt sum í fólkaskúlanum.

**§ 11.** Næmingarnir hava rætt til sernámsfrøðiliga hjálp og ráðgeving á sama støði sum næmingarnir í fólkaskúlanum.
*Stk. 2.* Sernámsdepilin veitir næmingunum í fmrískúlunum tímar til serligan tørv eftir somu reglum sum næmingum fólkaskúlans.
*Stk. 3.* Fmrískúlar hava rætt til somu tænastuveitingar frá Sernámsdeplinum sum fólkaskúlarnir hava.

## Kapittul 4
## Leiðsluviðurskifti

**§ 12**. Eitt skúlastýri skal verða valt til hvønn fmrískúla. Limir tess eru:

1. 2 foreldraumboð vald av og ímillum teirra, ið hava foreldramyndugleikan yvir teimum børnum, sum eru innskrivað í skúlan.
2. 2 umboð fyri áhugabólkin, sum rekur skúlan.
3. 1 umboð fyri starvsfólkið valt av og ímillum teirra, ið starvast í skúlanum.

Hesi hava øll atkvøðurætt. Formaðurin í skúlastýrinum skal verða valdur ímillum foreldraumboðini ella umboðini fyri áhugabólkin.
*Stk. 2.* Er eingin áhugabólkur knýttur at skúlanum, hava foreldrini rætt til umboðið hjá áhugabólkinum.
*Stk. 3.* Leiðari skúlans er skrivari stýrisins og tekur lut uttan atkvøðurætt á stýrisfundum.
*Stk. 4.* Kommunustýrið kann eftir áheitan frá skúlastýrinum gera av, at ein av limum tess er við á skúlastýrisfundi uttan atkvøðurætt.
*Stk. 5* Eitt umboð fyri næmingarnar kann eftir áheitan frá skúlastýrinum luttaka á stýrisfundunum.
Stk. 6. Valskeiðið hjá stýrislimunum er 2 ár. Landsstýrismaðurin ger reglur fyri valinum.

**§ 13.** Stýrið er ovasta leiðsla í skúlanum og virkar samsvarandi viðtøkum skúlans. Eftir tilmæli skúlastjórans staðfestir stýrið virksemið í einum skúlaári, eins og tað skal góðkenna skúlans rakstrarætlan og roknskap.
Stk. 2. Tá ið eitt stýri er valt, skal tað boða landsstýrismanninum frá, hvørjir limirnir í stýrinum eru. Broytingar í samansetingini av stýrinum skulu somuleiðis boðast landsstýrismanninum.

**§ 14**. Stýrið hevur mótvegis landsstýrismanninum ábyrgdina av virksemi skúlans.
Stk. 2. Um stýrið ikki fylgir boðum frá landsstýrismanninum um rætting av nærri ásettum viðurskiftum, kann landsstýrismaðurin gera av

1. at uppgávurnar hjá stýrinum heilt ella lutvíst verða røktar av persónum, sum landsstýrismaðurin hevur tilnevnt, ella
2. at stýrið fer frá, so eitt nýtt stýri kann verða valt eftir viðtøkum skúlans.

## Kapittul 5
## Starvsfólkaviðurskifti

**§ 15.** Skúlastýrið setur leiðaran, lærarar og onnur starvsfólk. Leiðarin kann seta starvsfólk, sum eru í arbeiði ein part av skúlaárinum.
*Stk. 2.* Høvuðsreglan er, at fólk við læraraútbúgving skulu setast í størv, sum krevja undirvísingarligan førleika.
*Stk. 3.* Skúlastýrið kann, um serligar grundir tala fyri tí, seta fólk uttan læraraútbúgving.

**§ 16**. Skúlin hevur ein leiðara, sum hevur ta fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna. Leiðarin hevur fyri stýrinum ábyrgdina av

1. at galdandi lógir og reglur verða hildnar
2. at undirvísingin verður framd samsvarandi galdandi reglum
3. at undirvísingarligu viðurskiftini eru í lagi
4. at tann av stýrinum góðkenda rakstrarætlan verður hildin
5. at skúlans virksemi er samsvarandi avgerðum og ásetingum stýrisins.

**§ 17**. Starvsfólk skúlans hava rætt til somu løn sum fólk í tilsvarandi størvum í fólkaskúlanum.

## Kapittul 6
## Fígging av rakstri og íløgum

**§ 18.** Virksemið hjá frískúlunum verður partvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. Írestandi fíggingin skal útvegast við foreldragjaldi og/ella privatum stuðli.
*Stk. 2.* Landsstýrisins partur av rakstrinum verður endaliga útroknaður eftir næmingatalinum hvønn 1. september í skúlaárinum. Stuðulin svarar til 85 % av góðkendu læraralønunum, útroknaður eftir lutfalsliga sama formli sum í fólkaskúlanum, tó kann stuðulin ikki fara upp um játtan sambært góðkendari fíggjarætlan uttan loyvi frá landsstýrismanninum.
*Stk. 3.* Skúlin skal lata inn fíggjarætlan fyri komandi fíggjarár áðrenn 1. juni.
*Stk. 4.* Heimstaðarkommunan hjá næminginum rindar kommunugjaldið
*Stk. 5* Kommununnar stuðul til næmingar í frískúlum verður útroknaður eftir kommununnar rakstrarútreiðslum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum í kommununi. Stuðul til hvønn næming í frískúlanum er 85% av rakstaraútreiðslum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum. Avdráttur, renta og leiga eru ikki íroknað rakstrarútreiðslunum.

*Stk. 6.* Kommununnar partur av rakstrarútreiðslunum smb. stk. 3 verður í fyrsta umfari rinda av landsstýrinum, og síðan býtir Føroya Gjaldsstova við ársenda rakstrarútreiðslurnar millum kommunurnar eftir heimstaðnum, næmingarnir smb. landsfólkayvirlitið hava 1.september.
*Stk. 7.* Eru eingi rakstrartøl fyri kommunalu útreiðslurnar, smb. stk. 3 og 6, roknar Føroya Gjaldstova eitt miðaltal út við grundarlagi í fimm teimum størstu kommununum.
*Stk. 8.* Foreldragjaldið verður ásett av stýrinum.
*Stk. 9.* Møguligt yvirskot hjá sjálvsognarstovninum kann ikki flytast til annað virksemi, men skal nýtast til rakstur ella íløgur.

**§ 19**. Landsstýrismaðurin kann halda aftur ella taka aftur stuðul, møguliga krevja stuðul afturgoldnan, um treytir fyri veiting av stuðli ikki verða hildnar.
*Stk. 2.* Um lønin í frískúlanum er hægri enn sáttmálasetta lønin, verður stuðulin útroknaður við grundarlag í sáttmálasettu lønini. Er lønin lægri enn sáttmálasetta lønin, verður stuðulin útroknaður við grundarlagi í útgoldnu lønini.

**§ 20.** Landsstýrismaðurin kann útvega góðkendum fríkúla sambært hesi lóg stuðul til ný- ella umbygging av skúla ella skúlaheimi.

## Kapittul 7
## Roknskapur og grannskoðan

**§ 21.** Roknskapurin hjá fríkúlum sambært hesi lóg skal gerast og setast upp samsvarandi ásetingunum um almennar roknskapir.
*Stk. 2.* Roknskapurin skal grannskoðast av løggildum grannskoðara. Grannskoðaður roknskapur og grannskoðarafrágreiðing skal sendast landsstýrismanninum.
*Stk. 3.* Grannskoðaradeild landskassans kann í sambandi við landsgrannskoðanina biðja um upplýsingar beinleiðis frá stýrinum.
*Stk. 4.* Um tað í grannskoðarafrágreiðingini, smb. stk. 2, verður víst á lógarbrot ella onnur óreglulig viðurskifti í sambandi við umsitingina av skúlanum, skal landsstýrismaðurin alt fyri eitt, um grannskoðanin gevur orsøk til tess, seta í verk tiltøk, sum aftur tryggja lóglig viðurskifti og fullgóða umsiting. Sama er eisini galdandi, um landsstýrismaðurin á annan hátt verður gjørdur kunnugur við nevndu viðurskifti.

## Kapittul 8
## Ymsar ásetingar

**§ 22.** Avgerð, sum skúlastýri og leiðari skúlans hava tikið, kann verða kærd til landsstýrismannin í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað. Landsstýrismaðurin ásetur gjøllari reglur um kærur.
*Stk. 2.* Reglurnar um innlit eftir fyrisitingarlógini og lógini um alment innlit galda fyri fríkúlar.

## Kapittul 9
## Gildissetan

**§ 23.** Henda lóg kemur í gildi 1. august 2001.
*Stk. 2.* Verandi stýri og nevndir, sum henda lóg fevnir um, sita, til nýggj stýri eru vald sambært nýggju lógini.
*Stk. 3.* Í løgtingslóg nr. 58 frá 2. oktober 1978 um skúlafyrisiting við seinni broytingum verða §§ 23-27 strikaðar.

# Viðmerkingar til uppskot
# um
# Løgtingslóg um frískúlar

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

Í Føroyum hevur tað ikki verið lógargrundarlag fyri at stovna, reka og játta stuðul til frískúlar.

Fyri *privatar skúlar* er heldur eingin lógarkarmur at halda seg til, hvørki viðvíkjandi virksemi ella studningi. T.v.s. at viðurskiftini hjá verandi privatskúla við tað almenna byggja á avtalur við Undirvísingar- og Mentamálastýrið, men tær hava einki lógargrundarlag at halda seg til.

Við hesum uppskoti til frískúlalóg er fyrst og fremst miðað eftir at gera so greiðar reglur sum til ber, bæði fyri góðkenning av frískúlum og fyri virksemi teirra, soleiðis at bæði foreldur, lærarar, skúlar og myndugleikar kunnu vita, hvat tey hava at halda seg til.

Mælt verður til, at hugtakið “privatir skúlar” verður avtikið, og at allir frískúlar verða skipaðir sum sjálvsognarstovnar. Hetta verður gjørt út frá teirri meting, at sjálvsognarstovnar betur enn privatskúlar samsvara við demokratisku siðvenjurnar í nútíðarsamfelagnum.

Bæði viðvíkjandi leiðslu og fígging ber betur til at seta sjálvsognarstovnum enn privatskúlum reglur, sum eru greiðar og lættar at gjøgnumskoða. Eisini verður rættur næminganna og foreldranna betur tryggjaður, tá ið frískúlin er skipaður sum sjálvsognarstovnur heldur enn privatskúli.

Einasti barnaskúli í landinum, sum verður rikin á privatum grundarlagi er Adventistaskúlin. Hann hevur havt í umbúna at broyta seg frá privatum skúla til sjálvsognarstovn, eins og adventistaskúlar aðrastaðni í ríkinum, men vegna ófullfíggjaða lógarkarmin fyri frískúlar er hetta ikki gjørt.

Tað er ilt at meta um avleiðingarnar fyri fólkaskúlan, um ein nýggj frískúlalóg verður sett í gildi. Verður ein frískúli settur á stovn í einum øki við fleiri smáum fólkaskúlum, kann ávirkanin vera stór, um hann fær undirtøku. Nakrir bygdaskúlar hava eitt næmingatal, sum er beint omanfyri ávikavist 15, 31, 49, 69, 91 ella 115. Koma færri næmingar í hesar skúlar, so fer skúlin eitt stig niður í flokkatali og fær færri tímar tillutaðar. Fyri skúlar, ið eins og hesir eru nær við markið fyri at fara niður í flokkatali, kann tað tí fáa stóra ávirkan, um nakrir næmingar fara í ein frískúla. Í størri kommununum verður ávirkanin ikki so stór í fyrsta umfari.

At tað eru fleiri sløg av skúlum kann fáa góða ávirkan á fólkaskúlar eins væl og frískúlar. Skúlarnir, í hesum føri leiðsla og lærarar, eru greiðir yvir, at nógv foreldur

fylgja gongdini í skúlanum, og at tey eisini vilja gjalda fyri at fáa tað, sum tey halda vera best til børn síni. Hetta kann hava við sær, at starvsfólk í hvørjum einstøkum skúla, tað veri seg fcrískúla ella fólkaskúla, stremba eftir at skapa ein betri skúla.

Í grannalondum okkara er fcrískúlin ein natúrligur partur av skúlaheildini, og hugsanin har er ikki, um hann hevur tilverurætt ella ei. Fcrískúlarnir eru rótfestir gjøgnum sítt virki seinastu øldina og hava í dag 5 - 15 % av næmingatalinum.

## Samandráttur av lógaruppskotinum

Samanumtikið hevur lógaruppskotið við sær, at fcrískúlar, ið lúka tær treytir, sum eru ásettar í lógini, hava rætt til at verða góðkendir. Lógin ásetur, at fcrískúlar verða stovnaðir sum sjálvsognarstovnar, har foreldrini, ein áhugabólkur og starvsfólki manna stýrið. Stýrið er ovasti myndugleiki. Tað setur og loysir starvsfólk úr starvi. Rætturin hjá næmingum og starvsfólki verður tryggjaður á fleiri økjum.

Raksturin av skúlunum verður tryggjaður við stuðli frá landsstýri og kommunum eftir føstum reglum. Hesar reglur áseta stuðulin til 85 % av læraralønum og rakstrarútreiðslum, samanborið við fólkaskúlan. Stuðul verður ikki veittur til hølisútreiðslur.

Landsstýrismaðurin hevur sambært lógaruppskotinum víðar heimildir í sambandi góðkenningar og eftirlitisuppgávur.

## Hoyringsskriv

Fyriliggjandi uppskot til løgtingslóg um fcrískúlar er sent til ummælis hjá:

1. Føroya Lærarafelag
2. Føroya Kommunufelag
3. Kommunusamtakinum
4. Adventistaskúlanum

## Umsitingarligar avleiðingar

Undirvísingar- og Mentamálastýrið fær økta abeiðsbyrðu orsakað av góðkenningar- og eftirlitsuppgávum. Hesar uppgávur hava tó eitt tílíkt vavi, at tað ikki verður neyðugt at seta nýggj starvsfólk. Arbeiðsuppgávurnar í sambandi við frískúlarnar verður ein partur av málsviðgerðini í sambandi við fólkaskúlarnar. Talið av frískúlum er avgerandi fyri, hvussu nógv arbeiðsbyrðan økist. Neyvari tøl kunnu ikki setast á útreiðslurnar. Eftir uppskotinum skal Føroya Gjaldstova krevja inn og samskipa gjaldið hjá kommununum, fyri síðani at mótrokna tað í skattinum. Hetta verður gjørt við grundarlagi í bústaðnum hjá næmingunum smb. fólkayvirlitinum. Umsitingin av hesum økta virkseminum hjá Føroya Gjaldstovu er eisini bundið at talinum av frískúlum. Um so er, at Føroya Gjaldstova samskipar kommunugjaldið, fáa kommunurnar ikki økta umsiting orsakað av lógini.

## Umhvørvisligar avleiðingar

Ongar umhvørvisligar avleiðingar eru av lógaruppskotinum.

## Altjóða reglur, sum hava ávirkan á viðurskiftini

Ein røð av millumtjóða sáttmálum ásetur rættin hjá foreldrum at skipa sínar egnu skúlar. Tvey høvuðssjónarmið gera seg galdandi í hesum sáttmálum:

1. Foreldur hava rætt at tryggja børnunum útbúgving í samsvari við sínar egnu sannføringar.
2. Foreldur hava rætt til at velja aðrar skúlar enn teir, sum eru skipaðir av almennu myndugleikunum.

Rætturin til at skipa og reka frískúlar er ein almennur rættur, sum er ásettur í ST-sáttmálunum um fíggjarlig, sosial og mentanarlig rættindi ( ØSK), smb. artikul 13.4 og í barnakonventiónini hjá ST, artikul 29 , § 2. Í hesum sáttmálum eru ávís mál ásett í sjálvari undirvísingini, men teir áseta eisini at myndugleikarnir hava rætt til at áseta minstu krøv til undirvísing og umhvørvi, áðrenn loyvi verður givið.

Lógaruppskotið um frískúlar ásetur ávís almenn krøv til frískúlar, men ásetur eisini, at umsøkjari, ið lýkur hesi krøv, hevur eitt rættarkrav um at fáa loyvi til at seta frískúla á stovn. Hetta samsvarar við krøvini í áðurnevndu sáttmálum, sum Føroyar eisini eru ein partur av.

## Fíggjarligar avleiðingar av lógaruppskotinum.

Tað er trupult at áseta neyvt, hvørjar fíggjarligar avleiðingar uppskotið hevur við sær, um tað verður samtykt. Orsøkinar eru, at tað eru so nógvir ókendir faktorar, sum hava ávirkan á fíggjarligu avleiðingarnar fyri land, kommunur og fólkaskúlan. Serliga trupult er við nakrari vissu at siga, um ella hvussu stórt tal av frískúlum verður sett á stovn, og somuleiðis, hvar í landinum teir kundu hugsast at verða stovnsettir.

Ein skúli er í dag skipaður á átrúnaðarligum grundarlagi, og tað kann ikki útihýsast at grundarlag er fyri einum ella tveimum afturat á sama grundarlagi. Møguleikar eru eisini fyri, at foreldur, sum ynskja ein námfrøðiligan valmøguleika til børn síni, taka seg saman og stovna ein fríkúla. Lógaruppskotið setur eina røð av krøvum til høli, undirvísingarætlan og góðkenning av ymiskum viðurskiftum, og tað vil í sær sjálvum hava darvandi ávirkan á gongdina. Tað skal eisini ein ávís fíggjarlig orka til fyri at seta ein fríkúla á stovn. Besta næmingagrundarlagið er í teimum størru kommunum, har fólkatalið er lutfalsliga stórt, og ávirkanin á fólkaskúlarnar í kommununi eru tá eisini minst.

## Fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar

Verður lógin samtykt, og eingin nýggjur fríkúli stovnaður, hevur uppskotið ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan ella nakra ávirkan á fólkaskúlan, men fyri Tórshavnar kommunu hevur lógaruppskotið øktar útreiðslur við sær. Kommunan letur Adventistaskúlanum 100.000 kr.í stuðli um árið. Verður lógin samtykt í verandi líki, hækkar henda upphædd til 85% av miðalrakstrarútreiðslunum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum. T.v.s. 85% av 107 x umleið 9.000 kr. = umleið 818.550 kr. Ein hækking, sum er góðar 700.000 kr. um árið.

Samlaðu útreiðslurnar til skúla hjá kommununi vil broytast á tann hátt, at rakstrarútreiðslurnar tengdar beinleiðis at næmingatalinum ( undirvísingaramboð o.t.) minkar lutfalsliga við næmingatalinum. Føstu rakstararútreiðslurnar verða óbroyttar (hiti, el. reingerð), meðan gjaldið til fríkúlan skal leggjast aftrat. Dømi niðanfyri lýsir, hvussu viðurskiftini kunnu verða.

Fólkaskúlin sum er (200 næm.):

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1 | a.<br>b.<br>c. | Undirvísingaramboð<br>o.t. Hiti, el, reingerð<br>Samlaðar rakstrarútreiðslur | 0,600 mió kr.<br>1,400 mió kr.<br>2,000 mió kr. | (=3.000,- kr. pr. næm.)<br>føst útreiðsla<br>(=10.000,- kr. pr. næm.) |
| 2 | Minni útreiðslur<br>Meir útreiðslur<br>Øktar útreiðslur | | 10 x 3.000=<br>10 x 10.000 x 85%= | ÷ 30.000,- kr.<br>85.000,- kr.<br>55.000,- kr. |

Uppskotið ásetur, at Føroya Gjaldstova fær heimildir at útgjalda fírskúlunum kommununnar part av stuðlinum við grundarlag í næmingalistum, sum fírskúlin sendir Føroya Gjaldstovu. Kommunali stuðulin til fírskúlarnar verður síðan mótroknaður í útgjaldinum til kommununar.

## Fíggjarligar avleiðingar fyri landsstýrið

Um ein ella fleiri fírskúlar verða settir á stovn, hevur hetta í prisippinum eina sparing við sær fyri landskassan, við tað at landið sambært uppskotinum einans rindar 85% av læraralønunum á einum fírskúla, meðan landið rindar 100% av læraralønunum til fólkaskúlan. Sostatt verða spard 15 % av tímajáttanini til læraralønir. Hendan sparingin má takast við fyrivarni. Tað er greitt, at hóast eitt ávíst tal av næmingum fer úr fólkaskúlanum, verður neyvan eitt tilsvarandi tímatal, sum verður undirvíst í fírskúlanum, spart í fólkaskúlanum. Skemalegging, næmingatal, flokkatal o.a. tíl. hevur ávirkan á tímatalið. Úrslitið verður tí neyvan ein sparing, sum er 15 %, men heldur frá 0 til 15 % alt eftir, hvussu nógvir fírskúlanæmingar verða úr økinum hjá hvørjum einstøkum fólkaskúla.

Samanumtikið kemur landskassin helst at hava færri útreiðslur til læraralønir enn áður, men tó ikki so mikið sum 15 %.

# Kapittul 2. Serligar viðmerkingar

*Viðv. §1.*

Við løgtingslóg um fírskúlar er rætturin til at stovna og reka fírskúlar tryggjaður. Hesin rættur er tryggjaður, um ávís viðurskifti, sum eru ásett í lógini, eru í lagi. Tá ið landsstýrismaðurin hevur góðkent fírskúlan, hevur hann rætt til tann almenna stuðulin, sum er ásettur í reglunum, sbr. tó við § 5. stk. 3.

*Viðv. §2.*

Tað er eitt krav, at fírskúlin bjóðar undirvísing í 1.-7. flokki. Øll floksstigini nýtast tó ikki at vera frá byrjan. Fírskúlin kann taka fyrsta flokk inn hvørt ár, soleiðis at hann eftir 7 árum hevur undirvísing í 1- 7. flokki; men tað skal frá byrjan vera greitt, at skúlin er *ætlaður* til minst 1.-7. floksstig. Umframt 1.-7. floksstig hevur fírskúlin rætt til at hava 8.-9. floksstig, men skal søkja um loyvi til at hava undirvísing út um 9. flokk. Forskúlaflokkar eru ikki enn ein náttúrligur partur av skipanini í fólkaskúlanum, og tí skal eisini verða søkt um loyvi í hvørjum einstøkum føri.

*Viðv. §3.*

Um ein fírskúli vil bjóða næmingum sínum somu royndir sum fólkaskúlin, kann hann biðja um loyvi til tað frá landsstýrismanninum. Men fírskúlin kann eisini leggja eina

aðra heildarætlan fyri 8-10. flokkarnar enn fólkaskúlin og nýtist tí ikki at hava royndirnar í sama árgangi sum fólkaskúlin. Um frískúlin av eini ella aðrari orsøk ikki sjálvur skipar fyri fráfaringarroyndunum, kunnu næmingar hansara við loyvi frá landsstýrismanninum fara til hesar royndir í fólkaskúlanum.

*Viðv. §4.*

Fyri at verða góðkendur skal frískúlin lúka ávísar treytir og hava eitt *grundarlag*, sum ger hann øðrvísi enn fólkaskúlan. Skúlin kann vera:

**1.** Ein fakligur og/ella námsfrøðiligur valmøguleiki í mun til almenna skúlan.
Ein *fakligur valmøguleiki* vil siga, at frískúlin leggur stóran dent á ávís øki ella lærugreinir, sum undirvíst verður meira í, enn vanligt er í fólkaskúlanum. Sum *dømi* um øki, ið dentur serliga kann verður lagdur á, kunnu nevnast: Handaligar lærugreinir, teldutøkni, fremmand mál, list, tónleikur, vistfrøði.
Ein *námsfrøðiligur valmøguleiki* merkir, at frískúlin hevur sítt egna pedagogiska grundarlag við øðrvísi mátum at skipa skúlan, skúladagin og undirvísingina.

**2.** Skipaður av átrúnaðarligum ella etiskum grundum.
Her kann talan vera um skúlar, ið verða stovnaðir av fólkum, ið hoyra til ávíst trúarsamfelag - ella av fólkum, ið ynskja ein skúla, ið er púra leysur av øllum átrúnaðarligum tilknýti.

**3.** Skipaður fyri at nøkta ein størri undirvísingartørv enn vanligt.
Ein møguleiki fyri tey, sum ynskja *meira* undirvísing enn tað, fólkaskúlin kann bjóða.

*Viðv. § 5*

Fyri at skúlin skal hava rætt til studning, krevst eitt ávíst næmingatal. Høvuðsreglan er, at minst 12 næmingar eru fyrsta árið, og at tað eftir 3 árum eru minst 28 næmingar. Um næmingatalið seinni fer niður um 28 næmingar, missir skúlin tó ikki rættin til almennan studning beinanvegin, men fær eina royndartíð. Víkjast kann frá høvuðsregluni um næmingatal, um skúlin heldur fram uttan stuðul. Landsstýrismaðurin eigur tá at taka heildarviðurskiftini hjá skúlanum til viðgerðar hvørt ár.

*Viðv. § 6*

Frískúlarnir verða skipaðir sum sjálvsognarstovnar. Sostatt verður rætturin til at skipa privatskúlar skerdur, soleiðis at privatskúlin skal verða skipaður sum sjálvsognarstovnur. Rættur foreldranna at undirvísa børnum sínum heima, smb. § 41 í fólkaskúlalógini, verður ikki ávirkaður av lógini. Men er talan um undirvísing av fleiri børnum í skipaðum viðurskiftum, verður kravd ein nevndarskipan við fleiri ábyrgdarfólkum. Landsstýrismaðurin ásetur meginreglurnar fyri sjálvsognarstovnarnar.

*Viðv. § 7*

Landsstýrismaðurin kann biðja um allar tær upplýsingar, sum eru neyðugar, fyri at hava eftirlit við frískúlanum. Upplýsingarskyldan hjá frískúlum er tó ikki størri enn hjá fólkaskúlanum.
Undirvísingarætlanin skal sendast Undirvísingar- og Mentamálastýrinum hvørt ár til góðkenningar. Hon skal metast sum ein heild, soleiðis at øll skúlagongdin frá 1. – 9.

( ella 7.). flokk skal havast við í grundarlagnum fyri góðkenningini. Landsstýrismaðurin kann til eina og hvørja tíð krevja innlit í fíggjarliga raksturin.

*Viðv. § 8*

Talið á skúladøgum verður ikki avmarkað til sama tal sum í fólkaskúlanum. Um stýrið heldur, at næmingar hava tørv á fleiri skúladøgum, so er eingin lógarásett forðing fyri tí.

*Viðv. § 9*

Greinin tryggjar, at hvørki bústaður, átrúnaðarligt tilknýti ella aðrar óviðkomandi avmarkingar ella krøv kunnu setast í sambandi við innskrivingina. Tær fyrisitingarligu reglurnar um javnrættindi eru galdandi við innskrivingina. Hóast børn hava sama rætt at verða innskrivað í ein frískúla, kann stýrið fyri frískúlan áseta almennar reglur fyri innskrivingini. Um ein frískúli hevur bíðilista, skal ein almenn reglugerð gerast.

Kommunustýrið í tí kommununi, har barnið býr sambært fólkayvirlitinum, hevur, smb. Fólkaskúlalógini, eftirlit við, at barnið fær undirvísing. Tí skal fRískúlin áðrenn 1. september boða kommunum frá, hvørji børn eru innskrivað í skúlan.

*Viðv. § 10*

Meðan fólkaskúlin er skúlin, sum hevur skyldu at taka ímóti øllum næmingum, so hevur ein frískúli undir heilt serligum umstøðum rætt at nokta einum næmingi pláss. Til tess at fyribyrgja, at næmingar við serligum trupulleikum flyta ov nógv millum skúlarnar, er ásett, at fRískúlin hevur skyldu at hava næmingin skúlaárið út. Stk. 2 tryggjar, at næmingar ganga eitt ár á hvørjum floksstigi.

*Viðv. § 11*

Sernámsdepilin hevur skyldu at veita fRískulum, lærarum, næmingum og foreldrum somu tænastu sum í fólkaskúlanum. Tað vil siga, at ráðgevingin, undirvísingin og aðrar tænastur eru ókeypis. Tímar til serligan tørv hjá næmingum fRískúlans verða veittir eftir somu reglum sum í fólkaskúlanum. FRískúlin hevur sjálvur ábyrgdina av miðfirraðu serundirvísingartímunum. Kunngerð nr. 132 frá 17. oktober 1990 um sernámsfrøðiliga ráðgeving er eisini galdandi fyri frískúlar.

*Viðv. § 12*

Stýrið hevur 5 limir. Foreldrini velja 2 limir og ein møguligur áhugabólkur velur somuleiðis 2 limir, meðan tey, sum starvast í skúlanum, velja tann 5. limin. Áhugabólkurin kan verða eitt foreldrafelag, ein felagsskapur, ein samkoma ella eitt virki. Um eingin áhugabólkur er, velja foreldrini 4 umboð í stýrið. Manningin av stýrinum samsvarar væl við manningina av skúlastýrunum í fólkaskúlanum. Foreldrini hava sostatt bæði ábyrgdina og rættin til at taka avgerðir. Leiðari skúlans hevur sum skrivari stýrisins eisini ávirkan á arbeiðið í stýrinum. Hann ger dagsskránna og skipar fyri, at avgerðir tiknar av stýrinum, verða útintar í verki.

*Viðv. § 13.*

Stýrið er ovasta leiðsla og hevur ábyrgdina av, at virksemi skúlans verður framt sambart viðtøkunumm. Landsstýrismaðurin ger meginviðtøkur fyri frískúlar. Meginviðtøkurnar

eiga greitt at áseta ábyrgdarøki skúlaleiðarans. Skúlastýrið kann ikki geva skúlaleiðaranum heimildir, um tað er ásett í lóg, kunngerð ella meginviðtøkunum, at nevndu heimildir liggja hjá stýrinum ella landsstýrismanninum. Landsstýrismaðurin hevur yvirumsjón við fríkúlunum, og tí skal stýrið boða honum frá, hvørjir limirnir í stýrinum eru.

*Viðv. § 14.*

Stýrið fyri skúlan hevur ábyrgdina av námsfrøðiliga og fíggjarliga virkseminum í skúlanum mótvegis landsstýrismanninum. Stýrisins evsta ábyrgd er staðfest her. Fyri stýrislimir galda vanligar reglur um endurgjaldsábyrgd; teir kunnu tó bert í undantaksføri ábyrgjast persónligan fyri skúlans skuldbinding.

Um landsstýrismaðurin metir, at virksemi skúlans ikki er í lagi, og stýrið ikki fylgir boðum hansara, kann hann tilnevna ein persón at røkja allar ella partar av uppgávunum. Hesar heimildir eiga bert at verða nýttar í serstøkum føri og bert í tíðaravmarkað skeið.

*Viðv. § 15.*

Tað er stýrið fyri skúlan, sum setur skúlaleiðaran. Eftir tilmæli frá leiðaranum setur tað eisini lærarar og onnur starvsfólk. Skúlaleiðarin kann seta fólk í fyribilstørv. Skúlastýrið sigur upp øll starvsfólk uttan umsókn. Skúlaleiðarin eigur at gera tilmæli til stýrið, tá talan er um uppsøgnir uttan umsókn.

Høvdstreytin fyri at verða settur í starv í fríkúlanum er lokin læraraútbúgving. Men havandi í huga, at talan er um ein fríkúla, og at tað eru fleiri sløg av læraraútbúgvingum og fleiri námsfrøðiligar áskoðanir, skal stýrið hava heimild at seta lærarar í starv, sum hava aðra námsfrøðiliga útbúgving enn góðkenda læraraútbúgving, og í serligum førum eisini at seta fólk uttan námsfrøðiliga útbúgving í starv.

*Viðv. § 16.*

Tað er skúlaleiðarin, ið undir ábyrgd stýrisins hevur dagligu leiðsluna av virkseminum. Hann sær til, at undirvísingin er í samsvari við góðkendu undirvísingarætlanina.

Tað er skúlaleiðarin, ið fremur meginreglur og avgerðir skúlastýrisins í verki.

Skúlaleiðarin hevur ábyrgdina mótvegis skúlastýrinum av, at tær avgerðir, ið verða tiknar viðvíkjandi virksemi skúlans, eru lógligar og innan fyri teir karmar, sum stýrið fyri skúlan hevur sett.

Um skúlaleiðarin sær, at ein samtykt, sum skúlastýrið hevur gjørt, er ólóglig ella uttan fyri heimildarkarmin, hevur leiðarin skyldu at gera landstýrimannin varugan við hetta.

*Viðv. § 17.*

Starvsfólk skúlans hava rætt til løn sambært sáttmála hjá yrkisfelag teirra. Tey kunnu tó gera avtalu við arbeiðsgevaran um lægri løn. Tað verður bert veittur landskassastuðul til

útgoldnu lønina, tó ikki meir enn sáttmálin millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag ásetur. Leys størv eiga at verða lýst alment. Setanarskriv skulu nýtast.

*Viðv. §18*

Landstýrisins partur av lærarалønunum er 85 %.Grundarlagið er, hvussu nógv hvør næmingur kostar í fólkaskúlanum. Verður játtanin til hvønn næming í fólkaskúlanum hækkað við ávísum prosentparti, hækkar játtanin til privatskúlarnar eisini við sama prosentparti.

Kommunali stuðulin til rakstrarútreiðslur er ætlaður til undirvísingartilfar, innbúgv, hita, el, reingerð og vanligt viðlíkahald. Kommunali stuðulin skal útroknast við grundarlag í vanliga rakstrinum. Byggi- og umbyggingarútreiðslur til skúlar, ítróttarhallir og svimjihallir eru ikki ein partur av útrokningargrundarlagnum hjá kommunum. Hvør einstakur fríkskúli avger sjálvur, hvussu hann nýtir rakstrarstuðulin.

Stýrið avger, hvussu foreldragjaldið verður ásett, t.d. um tað er eitt fast gjald fyri hvønn næming, ella um tað verður ásett eftir inntøku foreldranna. Stýrið avger eisini, í hvønn mun systkin skulu gjalda minni. Somuleiðis kann stýrið játta einstøkum næmingum fríplass.

Tað almenna, íroknað kommunurnar, letur ein stóran part av fíggingini til fríkskúlavirksemið. Tað er tí av almennum áhuga at tryggja sær, at stuðulin verður nýttur til endamálið. Stk. 9 skal tryggja, at eitt møguligt yvirskot verður nýtt til íløgur ella rakstur, og ikki flutt til annað virksemi.

*Viðv. § 19.*

Ymiskar ásetingar, sum tryggja landsstýrismanninum rættin til at minka ella krevja aftur stuðul, tá grundarlagið fyri útgjalding ikki er til staðar.

*Viðv. § 20.*

Landsstýrimaðurin fær heimildir til at útvega stuðul til bygging av skúla ella skúlaheimi.

*Viðv. § 21.*

Viðvíkjandi roknskaparviðurskiftum skulu sjálvsognarstovnar fylgja reglunum um almenna roknskaparhaldið. Grannskoðaradeild landskassans kann biðja um upplýsingar í sambandi við fíggjarløgtingslógina.

*Viðv. § 22.*

Landsstýrismaðurin er kærumyndugleiki. Av tí, at almenni parturin av fíggingini er so stórur, kemur virksemið undir reglurnar um innlit eftir fyrisitingarlógini og lógini um alment innlit.

*Viðv. § 23.*

Lógin kemur í gildi 1. august 2001, soleiðis at verandi skúli, kommunurnar og almenna fyrisitingin hevur tillaginartíð til 1. august 2001 til at umskipa viðurskiftini.

Reglurnar um privatskúlar og sjálvsognarstovnar í løgtingslóg um skúlafyrisiting verða strikaðar.